## Leiðbeining til næmingar

# Skrivlig próvtøka

### Formligt

- Tú skalt skriva ein samanhangandi tekst við støði í eini uppgávuorðing, sum fevnir um ein ella fleiri tekstir, sum skulu viðgerast við hóskandi fakligum háttalagi og setast í frásjón.
- Hóskandi longd á tínum teksti er 2-3 síður á 2.400 sløg.
- Reglufrástøðan skal vera 1,5, og skriftstøddin skal vera 12.
- Brúka skrift við fótum, t.d. Times New Roman.
- Sitat skulu frámerkjast við skákskrift ella gásareygum.
- Brúkar tú keldur, sum ikki eru partur av próvtøkutilfarinum, skulu tær uppgevast inni í tekstinum, ikki í fótnotu.

### Tekstslag

Teksturin, sum tú skalt skriva, er ein yrkistekstur, sum kundi verið alment útgivin. Tú ert sendarin, og móttakarin, sum tú skalt hava í huga, er ein vaksin føroyingur, sum er kunnigur um yrkorð og hugtøk, sum vanliga verða brúkt í lærugreinini føroyskum. Tí er ikki neyðugt at útgreina t.d. greiningarhugtøk. Móttakarin kennir tekstin/tekstirnar, sum tú skrivar um, men tó ikki allar smálutir.

### Bygnaður

Teksturin, sum tú skalt skriva, skal vera samanhangandi við inngangi, buli og útgangi. **Inngangurin** skal nerta við týðandi tættir í viðgerðini og vekja áhugan hjá lesaranum at lesa víðari. Í **bulinum** svarar tú uppgávuorðingini, og **útgangurin** er ein samanumtøka.

### Inngangurin

- Vek áhugan hjá lesaranum at lesa víðari. Tú kanst eitt nú byrja við einum fangandi setningi, sum knýtir seg til evnið, sum tú skrivar um. Hetta kann t.d. vera eitt orðatak ella ein spurningur, sum tú so kanst svara í útganginum. Tú kanst eisini byrja við eini kunning ella útsøgn um evnið ella við eini niðurstøðu, sum tú ert komin fram til, meðan tú hevur arbeitt við uppgávuorðingini.

## Bulurin

- Kunna um tekstin/tekstirnar, sum tú skrivar um (t.d. høvundur, heiti, ár og miðil) og greið heilt stutt frá innihaldinum. Far ikki ov nógv í smálutir, tí lesarin kennir tekstin/tekstirnar frammanundan.
- Uppgávuorðingin er í miðdeplinum. Tú skalt við fakligum amboðum og hóskandi háttalagi viðgera viðkomandi teksteyðkenni, sum síðan skulu verða grundarlag undir tulkingini/niðurstøðuni. Vís til tekstin/tekstirnar og nýt ítøkilig dømi at grundgeva við.
- Uppgávuorðingin fevnir eisini um frásjónargerð, tað kann eitt nú vera samanburður við annan tekst, ella at tú verður biðin um at seta tekstin ella evnið í eitthvørt høpi. Í frásjónargerðini er týdningarmikið, at tú sjálvstøðugt nýtir fakliga og almenna vitan.

## Útgangurin

- Útgangurin skal stutt taka samanum og vísa aftur til inngangin, soleiðis at samanhangur er í tekstinum hjá tær.

## Góð ráð

- Les allar uppgávuorðingarnar og hugsa teg væl um, áðrenn tú velur uppgávu. Tað er ikki neyðugt at lesa allar tekstirnar.
- Les tekstin/tekstirnar, tú hevur valt at skriva um, fleiri ferðir. Legg merki til viðkomandi teksteyðkenni og skriva hugskot og tankar niður, meðan tú lesur.
- Ansa eftir, at tú svarar allari uppgávuorðingini.
- Ansa eftir, at uppgávusvarið samsvarar viðmerkingini til uppgávuorðingina.
- Minst til at brúka viðkomandi faklig hugtøk.
- Tillaga inngang og útgang, tá ið tú ert liðug/ur, so hesi skapa samanhang í tekstin.
- Nýt í størst møguligan mun føroysk orð heldur enn fremmandaorð.
- Ansa eftir, at setningarnir ikki verða ov langir.
- Rættles væl fleiri ferðir og nýt hjálparmiðlar sum orðabøkur og rættstavara, um hesi eru tøk.